# Ríki Jákup í søgn og søgu

*John Davidsen*

Jakob Jakobsen, 1898–1901 hevur hesa søgn um Ríka Jákup:

»Jákup bóndi á Selatrað í Eysturoy, kadlaður »ríki bóndi« edla »ríki Jákup«, var fátæksmanssonur av Velbastað í Suðurstreymoy. Hann var first húskadlur í Hoyvík í Suður-streymoy og spardi sær fitt saman har av løn sínari. Kenn-ingarær fekk hann at ganga, sum átti annaðhvørt árið tvey lomb, annaðhvørt trí. So giftist hann til Selatraðar. Ógvu-liga gírigur maður var hann og kargur, og av tí at hung-ursár vóru í Føroyun í hansara tíð, bar tað væl í lag hjá honun at keypa jørð frálíka bíliga, helst fyri gamlan mat: hálvspilt kjøt, fisk, kodn og tílíkt. Á henda hátt samlaði hann sær 60 óðalsmerkur og fekk navnið Ríki Jákup. Hann átti mestur adla vestursíðuna av Eysturoynni: Selatrað og adlan vegin norður ettir beint í Kodlin á Eiði – uttan Oyrargarð einsamadlan. Á kvørjun ári ferðaðist hann norður til Eiðis til at higgja ettir øllun tí, sum hann átti, og kvørja ferð ið hann tá kom fram við Oyrargarð, sló hann stavin í garðin av idlsinni um tað, at hetta petti skuldi liggja ímidlun og hann sjálvur ikki eiga alt.

Ríki bóndi hevði góða eydnu til alt uttan til hønu. Kom hann til at bera kannu av hesun fugli, so doyði. Um ríka bónda og sinirnar – tveir sinir átti hann – er eitt tiltikið, sum væl sínir skapið í hinun gamla. Eina ferð, meðan

báðir brøðurnir vóru smádreingir enn, hevði annar teirra á orði við hin gamla: »Pápi, lat meg fáa hatta lambið!« »Kvat skalt tú gera við tað?« spurdi hin gamli. »Eg skal drepa tað,« svaraði hin lítli. Tá idlbrínskaðist Jákup. »Sig, tú skalt sleppa tað upp!« líddi hin baggin – hann visti, kvussu pápin var – og hin, ið pápan hevði biðið, so gjørdi. Tá blíðkaðist hin gamli og segði: »Ja, lambið skalt tú fáa.«

— — —

Annar sonur ríka Jákups, Sakaris nevndur, giftist til Streymnes í Norðstreymoy; annar var ettir á Selatrað.

— — —

Eitt tímaglas, eitt høvuðvatnsegg og eitt arvagudl (ein gudlpeningur), sum ríki Jákup hevur átt, eru enn til skjals.«

Jakob Jakobsen gjørdi lítið av at leita í skjølum eftir søguligum upplýsingum um tey fólk, sagnirnar ganga um. Hann helt seg til tað, sum komið var upp á prent, og sjálvandi mest til N. Andersen: Færøerne 1600–1709. Á síðu 268 í hesari bók stendur Jakob Zachariassen millum aðrar løgrættumenn, men tað verður ikki sagt eitt orð um, at hetta er Ríki Jákup á Selatrað. Tískil er lítið søguligt um Ríka Jákup at finna í viðmerkingunum hjá Jakob Jakobsen til hesa søgnina. Men av tí at meginparturin av søgnini snýr seg um suðuroyarprestin Johan Hendrik Weyhe, sum giftist við langabbadóttur Jákups, er Jakob Jakobsen í Suðuroyar kalsbók komin fram á hesa upplýsing um Ríka Bónda:

»– den i 17de Aarhundrede bekjendte rige Bonde Jakob Sachariassen paa Selletræd, der havde tilkjøbt sig en betydelig Deel af det adelige Jordegods, der blev solgt af Søren Larsen Fohrmann.«

Anton Degn helt seg vita, hvørjum fólki Ríki Jákup var av. Í Færøske Kongsbønder 1584–1884 síðu 193, har hann greiðir frá kongsjørðini á Selatrað, hevur hann aftur at navninum Jakob Zachariassen hesa parentesina: »en Søn af Zacharias Joensen, Kolter.«

Sakaris Joensen, sum í jarðarbókunum stendur skrivaður sum bóndi í Koltri frá 1584 til 1628, hevði frá 1600 eisini festi á Velbastað. Søgnin sigur, at Ríki Jákup var slektaður av Velbastað, og skjølini vísa, at hann skrivaðist Zachariassen, so her ber væl til at slútta sær, at Sakaris í Koltri ella á Velbastað var pápi hansara. Men søgnin mótmælir við orðinum »fátæksmanssonur«. Sakaris, sum hevði átta merkur í Koltri og minst fýra merkur á Velbastað, kann ikki sigast at hava verið fátækur maður.

Teir, ið siga frá søgnum, kunna mangan minnast skeivt, eitt nú tíð og stað, men teir mistaka seg sjaldan í tílíkum, sum viðvíkur stætti og ætt. Tað ævintýrkenda í ævisøgu Ríka Jákups er júst tað, at hann var komin av fátækum fólki, men sum tann eydnumaður hann av sonnum var, ið hevði góða eydnu til alt uttan til hønu, kom hann at verða ein av landsins størstu óðalsbóndum.

Nú vil so væl til, at vit í stuttum líki hava ævisøgu Ríka Jákups av hansara egna munni. 1691 og tvey ár seinni vitnaði hann í eini marknatrætu millum Velbastað og Hoyvík, og frásøgn hansara ljóðar nakað soleiðis:

Tá ið hann sum 15 ára gamal drongur var heima hjá foreldrum sínum í Kaldbak, bað Aggusteinis Lydersen í Hoyvík hann til fjals [her kemur so tað, sum viðvíkur trætumálinum], og tænti hann í Hoyvík í tíggju ár og var seyðamaður bæði í Sunds og Hoyvíks haga, og vóru tað 50 (52) ár, síðani hann var farin haðani.[1])

Søgnin og vitnisburðurin hjá Jákupi svara væl saman, burtursæð frá tí, at Velbastaður stendur sum heimbygd hansara í staðin fyri Kaldbak.

Eftir hesum vitnisburði hevur Jákup í 1691 verið um leið 75 ára gamal og skuldi so statt verið føddur um 1616. Í sakfalslistanum í Tingbókini 1615—54 síðu 62 stendur undir yvirskriftini Strømøy Anno 1617: »Sacharias Joennssenn (Mickellssen) udi Kalbach for hand belaa sin feste pige bøde thill K: M: ijgl.«

---

[1]) Løgtingsbókin 1690—1718. Samuel Petersens kopibók 1695—1736.

Einki er at ivast í, at tað er pápi Jákups, sum her verður sektaður fyri at vera komin fyri barn fyri tíðina, og hvør annar man tað vera enn Jákup sjálvur, sum soleiðis skorar seg inn í heimin. Hvørki søgn ella skjøl gretta eitt orð um, at hann átti systkin. Sakaris vita vit annars einki um, men kunna slútta okkum til, at hann og konan, sum ikki verður nevnd, hava tænt hjá onkrum bónda har í bygdini; tey hava kortini havt egið búgv, tí sigur Jákup, at hann var heima hjá foreldrum sínum.

Um 1631 er Jákup farin til Hoyvíkar at tæna hjá Aggu-steinisi, sum eisini var bóndi á Sundi. Her gevur hansara ævintýrliga eydna seg til sjóndar í kenningarærini, sum annaðhvørt árið átti tvey lomb, annaðhvørt trý.

Tíggju ár seinni, um 1641, fer Jákup úr Hoyvík til Sela-traðar – søgnin sigur, at hann giftist hagar. Av fyrstan tíð man hann vera komin hagar sum húskallur, men ikki hevur verið leingi, til hann sat sum bóndi á garðinum.

Kongsjørðin á Selatrað var tá skift sundur í 5 festi: hálv-sætta mørk úti á Heyggi, hálvtriðja í Miðtúni[1]) og eitt seksmarka- og tvey fýramarkafesti heimi á Bø. Jóannes Antoniussen var tá høvuðsmaður í bygdini og sat heimi á Bø við 11 mørkum.[2]) Hann var maður í bestu árum, var giftur og átti tvey børn. Svágur hansara, Páll Jacobsen á Oyri, sum var løgrættumaður, hevði umframt Oyrargarð 2 merkur heimi á Bø, Miðtúnsfestið og eina hálvmørk norð-uri við Skála. Um hetta mundið tykist hóttafall at vera komið á Jóannes. Í sakfalslistanum 1641 fyri Eysturoyar sýslu stendur: »Johannes Antonissøn for et Faar, han tog i sin Baad og siden slibte det paa Landet. Kan sig ikke lovverge, bøde 2 Øre Sølver og blive minde Mand.«[3]) Í jarðarbókini 1641/42 er hann við sama lag skrivaður sum bóndi. Tær tríggjar fylgjandi jarðarbøkurnar 1642/43–1644/

---

[1]) Hjá A. Degn, 1945 eru nøvnini á I og II umskift, og Miðhorn er misskrivað fyri Miðtún.

[2]) Jarðarbókin 1628/29.

[3]) Tingbókin 1615–54.

45 eru ikki longur til, men tá ið vit í 1645/46[1]) fáa aftur um endan, situr Jákup við øllum trimum festunum hjá Jóannesi og — tó tað stendur ikki nevnt í jarðarbókini — er giftur við einkju hansara, sum vit annars lítið og einki vita um.

Á annan hátt ber til at tíðarfesta hetta bóndaskifti gjøll=ari. Jákup tykist at hava verið væl í øgn við Páll á Oyri. 5. avgust 1643 læt hann Jákup og ikki Jógvan sonin, sum seinni varð løgmaður, festa kongshálvmørkina norðuri við Skála. Søgnin veit at siga, at Jákup átti tveir synir, og at annar æt Sakaris — hann er annars nevndur í søgnini um Hvalvíks=Jógvan.[2]) Tann eldri, Páll — hvør veit, um hann ikki er uppkallaður eftir Páll á Oyri — sigur seg í tings=vitni frá 4. oktober 1690 vera 48 ára gamlan,[3]) og í Eystur=oyar kirkjubók stendur skrivað, at hann varð jarðaður við Sjóvar kirkju á Strondum 1. juni 1728, 85 ára gamal. Eftir hesum skuldi hann verið føddur 1642—43.

Um 1649 man Páll á Oyri vera deyður. Jógvan hevur tá fest Oyrargarð, mamma hansara, Anna Antinisdóttir, situr við Miðtúnsfestinum, og Jákup er nú einsamallur um allar 14 merkurnar heimi á Bø. Trý ár eftir tað festi hann Mið=tún, og onkuntíð seinni — allar jarðarbøkurnar frá 1653 til 1705 eru burturkomnar — fekk hann hendur á festið úti á Heyggi. Eftir nøkrum fáum árum hevur tað eydnast fátæks=manssoninum úr Kaldbak at leggja undir seg alla kongs=jørðina á Selatrað, hálvmørkina norðuri við Skála ikki at gloyma — og enn var hann maður í bestu árum.

Men Jákup dugdi meira enn at kradda jørð undir seg. 5. avgust 1643 — sama dag hann festi hálvmørkina — sat hann sum tólvti løgrættumaður saman við løgmanni í Havn »paa menige Landsens Indbyggeres Vegne anlangendes Landsens Gavn og Bedste paa mange Maader om at for=

[1]) Á ríkisskjalasavninum í Oslo eru varðveittar tríggjar jarðarbøkur, 1645/46, 1647/48 og 1648/49, sum A. Degn ikki visti av.

[2]) Jakob Jakobsen, 1898—1901.

[3]) Kommissionsbetænkningen 1709—10.

handle.«[1]) Hetta er fyrstu ferð, hann er nevndur í teimum skjølum, sum til eru. Sum stórbóndi og løgrættumaður formáddi hann sær ikki lítið. Tað gav at bíta, tá ið menn klagaðu um, at Balzar Jacobsen løgmaður tað árið, hann var fúti (1655), hevði hækkað markatalið eitt nú í Koltri við einari mørk og á Selatrað við eini hálvari. Koltursmenn klagaðu fleiri ferðir og fingu ongar sømdir; men hálvmørkin á Selatrað varð strikað úr jarðarbókini.[2]) Í flestum førum sita slíkir menn um sátt við hægstu myndugleikarnar. Tað er tí ikki at undrast á, at í tí stóra sakarmálinum móti Søren Pedersen fúta og hjálparmonnum hansara (1672) vitnar Jákup, »at han er vel kommen af med hans Leje og haver sig ej i nogen Maader at besvere.«[3]) Spurdur um, hvussu nógv hann hevði givið fyri festið, svaraði hann, at fyri 22 merkur í jørð hevði hann latið 50 dálar og 3 tunnur av tálg og smøri, og legði aftrat, at »det gjorde han af sin egen gode Vilje og ej efter nogen Anfordring derom eller (af) nogen tiltvunget.«[3]) Gamalt festigjald hevði verið gyllin fyri mørkina; Jákup hevur givið $3^{2}/_{3}$ gyllin, men aðrir máttu gjalda meira. Fyriskipanin frá 16. apríl 1673 ásetti tríggjar gyllin fyri mørkina.[4])

26. oktober 1667 læt hann báðar synirnar í felag festa alla kongsjørðina á Selatrað[5]) — líkt er til, at kona hansara er deyð um hetta mundið. Synirnir giftust við prestadøtrum úr Vágum;[6]) tær vóru konusystrar Jógvan løgmann, og ber hetta prógv um, at Selatraðarbrøðurnir, sum teir vóru nevndir, stættarliga vóru mettir javnt við teir mætastu menn í landinum. Sakaris giftist ikki, sum søgnin sigur, til Streymnes, men flutti seinni hagar at búgva.

---

1) Tingbókin 1615–54.

2) Løgtings- og Vártingsbókin 1655–66.

3) Løgtingsbókin 1666–77.

4) N. Andersen, 1895. Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission.

5) A. Degn, 1945.

6) N. Andersen, 1895.

Nú Jákup hevði latið kongsið frá sær, fór hann at nøra um ognina. Av tí at einki skiftibræv er varðveitt hvørki eftir Jóannes ella Jákup, ei heldur eftir synir hansara, vita vit ikki, hvat ið var av óðalsjørð í búnum, tá ið Jákup giftist, og heldur ikki, hvussu nógvar merkur hann hevði fingið samlað sær, áðrenn hann doyði. Søgnin sigur, at hann átti 60 óðalsmerkur. Sama verður sagt um harra Klæmint[1]), so hetta talið nýtist ikki at verða tikið fyri annað enn at merkja »almikið av eigindómi.«

Í søgnunum fáa hesir báðir menn sama eftirmæli — presturin er enntá verri uppmálaður enn bóndin —: gírigir kraddarar, sum í hungursárum ríkaðu seg upp við at lata gamlan og hálvspiltan mat fyri jørð. Skiftibrævið eftir harra Klæmint[2]), sum doyði 1688, vísir, at hann átti 47 merkur í jørð, og ikki ein snøkil at kalla var av tí so-kallaðu aðalsjørð, sum í hesum tíðarskeiði stóð føroyskum bóndum og embætismonnum í boði at keypa.[3]) Ein part av hesum jarðargóðsi hevur harra Klæmint óivað fingið við konu síni, sum var prestadóttir og í móðurætt av føroyskum valafólki[3]), men ikki man tann parturin hava verið minni, sum hann sjálvur hevur forvunnið sær eitt nú við at læna fólki pengar ella peningsvirði móti veðhaldi í jørð, sum hann treyður læt av hondum aftur, og við at taka fólk í uppgávu — kryplar, ómagar og gomul, ið áttu nakað av jørð, sum prestur so kannaði sær, tá ið tey doyðu. Ríki Jákup hevur sum aðrir stórbøndur í teirri tíðini og seinni gjørt tað sama, men tað vit duga at síggja, hevur hann als ikki verið so grovur sum harra Klæmint. Her er Suður-oyar kalsbók sannari enn søgnin, tá ið hon sigur, at Jákup »havde tilkjøbt sig en betydelige Deel af det adelige Jordegods, der blev solgt af Søren Larsen Fohrmann.«

Av yvirlitinum hjá A. Degn[4]) sæst, at Jákup keypti

---

1) Jakob Jakobsen, 1898–1901.
2) Kirkjulig skiftibók I.
3) N. Andersen, 1895.
4) Varðin XIII. Løgtingsbókin 1680–90.

| | |
|---|---|
| 15/10 1667 4 merkur í Sørvági fyri ..... | 400 speciudálar |
| 24/7 1670 6 merkur í Streymnesi fyri... | 900 speciudálar |
| 8/9 1671 3/4 mørk á Skála fyri ......... | 80 speciudálar |
| 8/9 1671 1/2 mørk við Norðskála fyri ... | 85 speciudálar |
| 6/8 1673 31 merkur á Eiði fyri ......... | 3600 speciudálar |
| 18/8 1674 2 merkur á Strondum fyri ... | 200 speciudálar |
| 18/8 1674 1 1/4 mørk við Norðskála fyri . | 215 speciudálar |
| 9/11 1678 1/2 mørk í Sandavági fyri .... | 70 speciudálar |
| Tilsamans 46 merkur fyri ... | 5550 speciudálar |

So nógvan pening hevur Jákup sjálvandi ikki havt til taks, og vit vita bert um ta einu ferðina, at maður hevur lænt honum 100 dálar.[1]) Men honum nýttist ikki so nógvan reiðupening. Tær 31 merkurnar á Eiði fekk hann við at plikta seg til at gjalda keypspeningin — og tað vil siga 2/3 av peninganøgdini, sum øll henda keypajørð kostaði — innan 5 ár,[2]) og so seint sum 24. juli 1691 — tá var Servin Lauritsen Fohrmann deyður — skyldaði hann enn 2050 dálar.[3])

Tó at hann hevði sett seg í stóra skuld við sínum jarðarkeypi, tók hann ikki meir enn vanliga leigu frá festarunum uttan av jørðini á Strondum. Tann gamla leigan av báðum mørkunum var 2 gyllin. Av aðrari mørkini fekk hann 12 gyllin, men harav gingu 5 gyllin til tann fyrra festaran — Pætur Antoniussen í Tjørnustovu í Norðragøtu, beiggi Jóannes á Selatrað — sum við góðfjøldum hevði latið jørðina frá sær.[2]) Fyri hina mørkina kravdi hann 10 gyllin, tí hann átti sjálvur »alt Aabunen derpaa af Søed og Nøed,« meðan festarin segði seg vera útarmaðan av hesari tungu leigu og vildi sleppa at sita fyri ta gomlu leiguna; teir samdust so um 6 gyllin í hosum árliga.[1])

Søgnin sigur, at »hann átti mestur alla vestursíðuna av Eysturoynni: Selatrað og allan vegin norðureftir beint í Kollin á Eiði — uttan Oyrargarð einsamallan.« Kanna vit eftir, so síggja vit, at hetta er ikki so ógvuliga nógv av-

[1]) Løgtings- og Vártingsbók 1667—90.
[2]) Løgtingsbók 1680—90.
[3]) Løgtingsbók 1690—1718.

gjørt. Umframt kongsjørðina, sum synirnir høvdu fest, átti hann ið hvussu er 2 óðalsmerkur á Selatrað,[1]) so hann hevur rátt yvir $^{4}/_{5}$ av bygdini. Haraftrat kom stív helvt av jørðini við Norðskála og útvið $^{2}/_{3}$ av Eiðis bygd. Ei dáni í, at søgnin sigur, at hann var illur um, at tólvmarkagarðurin á Oyri skuldi liggja ímillum og hann sjálvur ikki eiga alt. Sum áður sagt tykist Jákup at hava verið væl í øgn við Páll á Oyri og konu hansara; eftir øllum at døma hevur hann eisini samst væl við son teirra Jógvan løgmann, sum doyði um 1679 – sama árið sum Jákup fyri aldur segði seg út úr løgrættuni.[2]) Árið eftir var hann á ólavsøkutingi og hevði stevnt løgmanseinkjuni, fútanum og Pálli á Oyri um leigu og burturfesting av jørð norðuri við Skála.[3]) Fyri løgmanseinkjuna legði fútin fram sáttmála millum Jákup og Jógvan løgmann, sum segði, at Jógvan og kona hansara sínar lívstíðir skuldu njóta mørkina og áttatiálina, sum Jákup átti norðuri við Skála, fyri vanliga leigu – 13 skinn. Jákup segði seg í tvey ár hava fingið 2 gyllin árliga frá løgmanseinkjuni og helt fram, at Jógvan umframt vanliga leigu hevði lovað sær eitt ankar av smøri ($3^{1}/_{3}$ gyllin), og at hetta kundi váttast av vitnum, sum tó ikki vóru løgliga stevnd, og tí bað hann um at útseta sakina til fyrsta haldandi ting. Løgrættan gjørdi av, at Jákup skuldi vera nøgdur við ta leigu, sum sáttmáli var gjørdur um, til hann kundi prógva, at honum var lovað meira. Hetta málið kom ikki fyri aftur á tingi, og løgmanseinkjan man hava sitið við jørðini til sín doyggjandi dag 6. mai 1714.[4])

5. mai 1679 hevði fútin Christopher Heidemann fest Pálli Joensen Oyrargarð og hálvmørkina norðuri við Skála. Jákup legði nú fram festibræv sítt frá 5. avgust 1643 og helt, at hann ráddi sjálvur fyri, um hann framvegis sat við jørðini ella læt annan sonin festa hana. Fútin segði, at tað

---

1) Kommissionsbetænkningen 1709–10.
2) Løgtings- og Vártingsbókin 1667–90.
3) Løgtingsbókin 1680–90.
4) Anders Nielsens álmanakki.

var tilskilað í festibrævinum hjá Pálli, at Jákup sína lívstíð skuldi njóta jørðina, sum av røttum átti at liggja undir Oyrargarði, og til at prógva hetta legði hann fram eitt festibræv frá Strange Madsen, sum var fúti 1599–1620.[1]) Løgrættan dømdi, at Jákup skuldi sita við jørðini sína lívstíð, og tá hann var deyður, kundi fútin festa hana burtur eftir lóg og kongligari fyriskipan. Fútin mótmælti og vónaði, at hægsti rættur fór at góðkenna hansara festibræv. Men tað varð av ongum, og 11. oktober 1690 festu synir Jákups eina áttatiál hvør.[2])

Á vártingi koma av og á trætumál fyri millum oyrarbóndan og norðskálamenn, og hetta man hava verið atvoldin í, at Jákup 1692 friðlýsti sín óðal og eigindóm norðuri við Skála.[3])

Sum áður sagt hevði Jákup tvey stjúkbørn: Jógvan í Britustovu á Eiði, sum var giftur við Marjuni, dóttur Tummas á Oyrareingjum, og Siggu, ið giftist við Pæturi Eidensen í Soylugørðum — 100 dálar fekk hon frá stjúkpápanum, tá ið hon giftist.[4]) Jóannes, ein sonur Jógvans, sum frá barnsbeini hevði verið hjá Pálli pápabeiggjanum, kom fyri barn við Maluni, dóttur hansara.[3]) Á vártingi 1692 vórðu tey dømd at hava fyrigjørt ogn sínari. Men tey áttu einki. Jógvan í Britustovu segði, at ein gríma var tað einasta, hann hevði givið soninum. Páll segði seg ikki hava annað enn skuld. Jákup, sum eisini varð spurdur, svaraði, at einki hevði hann givið børnum sínum, tiansheldur barnabørnunum. Malan giftist 9. oktober 1698 við Hanus í Niðristovu í Hvalvík.[5]) Jóannes fór til Fugloyar og giftist við einari einkju í Uppistovu í Hattarvík — hann er nevndur Eiðismaðurin í søgnini um Jógvan og Eyðun Tróndarson.[6])

---

1) N. Andersen, 1895.
2) A. Degn, 1945.
3) Vártingsbók 1690–97.
4) Vártingsbók 1707–13.
5) Eysturoyar kirkjubók.
6) Jakob Jakobsen, 1898–1901.

Í skjali, dagfest 6. desember 1693, avkannaðu stjúkbørnini sær móðurarv, men kortini tóku arvingar teirra upp søksmál við Selatraðarbrøðurnar nøkur ár eftir, at Jákup var deyður — hann hevði, sum tikið verður til, »skaltet og valtet med boens midler.« Einki spurdist burturúr uttan tað, at Jógvan og kona hansara skuldu hava eina hálvmørk leiguleysa, so leingi tey livdu.[1])

Í Eysturoyar kirkjubók stendur skrivað, at Jákup doyði og varð jarðaður 25. avgust 1699, 108 ára gamal! Eftir hansara egnu frásøgn hevur hann ikki verið meir enn 82—83 ár. Til samanberingar kann verða nevnt, at lagsbróðir hansara, Óli Trondesen, sum doyði 3 ár frammanundan, í kirkjubókini verður sagdur at vera 90 ára gamal, og vit vita, at Óli var eldri enn Jákup: hann hevði verið húskallur í Hoyvík í 12 ár, tá ið teir báðir fóru til Selatraðar, og fyri ta tíð hevði hann tænt á Velbastað.[1]) Men hetta er ikki einasta dømi um, at tær sokallaðu primeru keldurnar ikki altíð eru eftirfarandi.

## SUMMARY

In his book »Færøske Folkesagn og Æventyr« (1898—1901) Dr. Jakob Jakobsen has a folk-story about »Ríki Jákup á Selatrað«. This Rich Jákup is said to have been a poor man's child from the village of Velbastað, who for some years worked as a »house-karl« at Hoyvík and later married a woman from Selatrað and went to live there. When hunger prevailed in the islands, he sold half-tainted food to poor people taking their fields in return and thus amassing 60 »merkur« (a »mørk« is the basic unit of land valuation) of »óðalsjørð« (i. e. private land in contrast to »kongsjørð«, which was land belonging to the Crown).

In old land registers and records of the Thing (formerly acting as a court) we find historical information — some of it from his own mouth — confirming that on the whole the legend is true, except as regards his native village and the purchase of land.

Jákup with the family name Zachariassen was born in 1616 or 1617

[1]) Løgtingsbók 1690—1718. Samuel Pedersens kopibók 1695—1736.

at Kaldbak of poor parents. From 1631 he served as a »house-karl« at Hoyvík for 10 years. In 1642 or 1643 he married a farmer's widow at Selatrað, and gradually he obtained copyhold of all »kongs« holdings in that village. We do not know for certain how much land Rich Jákup owned, but the greater part of his property was not extorted from starving people. During the years from 1667 to 1678 he bought from the merchant Severin Lauridsen Fohrmann and others 46 »merkur« of land, formerly owned in the Faroes by Danish-Norwegian noble families.

Jákup died in 1699, 82 or 83 years old according to himself, but the parish register states his age at 108 years!

## BÓKMENTIR


1. N. Andersen: Færøerne 1600–1709. København 1895. 2. útg. Tórshavn 1964.
2. Anton Degn: Færøske Kongsbønder 1584–1884. Thorshavn 1945.
3. Jakob Jakobsen: Færøske folkesagn og æventyr. København 1898–1901. 2. útg. Tórshavn 1961–64.
4. Kommissionsbetænkningen 1709–10 v. A. Degn. Thorshavn 1934.
5. Løgtingsbókin 1666–77 v. Einar Joensen. Tórshavn 1961–64.
6. Løgtings- og vártingsbókin 1655–66 v. Einar Joensen. Tórshavn 1958–62.
7. Tillæg til Forslag og Betænkninger afgivne af den færøske Landbokommission. København 1911.
8. Tingbókin 1615–54 v. Einar Joensen. Tórshavn 1953–56.
9. Varðin. Bind XIII. Tórshavn 1933.